# Fyrsti ársfundur hjá ABC barnahjálp í Føroyum

**Týskvøldið, 15. mai 2007 klokkan 20.00, verður fyrsti ársfundurin hjá ABC barnahjálp í Føroyum hildin í Miðlahúsinum í Vágsbotni í Havn. Á Fundinum verður greitt frá arbeiðinum, sum nú er byrjað í Liberia. Eisini er ætlanin at fáa einstaklingar og fyritøkur at tekna seg sum ABC vinir á fundinum, sum er almennur**

ABC BARNAHJÁLP
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Á fyrsta ársfundurin hjá ABC barnahjálp í Føroyum verður greitt frá um verkætlanin í afrikanska landinum Liberia.

Í dag eru um 200.000 foreldraleys børn í Liberia. Uttan hjálp uttanífrá hava hesi børn lítlar og ongar vónir um skúlagongd og útbúgving. ABC barnahjálp ynskir verkætlanini at vera við til at skapa so nógvum av hesum børnum, sum yvirhøvur gjørligt, møguleika til skúlagongd, útbúgving og varandi menning.

Arbeiðið við at gera veg er longu byrjað.

- Arbeiðsloysi í landinum er stórt og tað stendur ikki á at fáa arbeiðsmegi, sigur Matthew Zakeuh, sum leiðir arbeiðið í Liberia. Hann roknar við, at bygningarnir kunnu standa klárir umleið desember 2007 - februar 2008.

Skúlar og skúlaheim hjá ABC barnahjálp verða rikin við fíggjarligum stuðli frá stuðulsforeldrum. Verkætlanin í Liberia byggir eisini á jarðarbrúk, sum eitt lið menning til sjálvbjargni.

Endamálið hjá ABC barnahjálp er at útvega faðir- og móðurleysum og fátækum børnum varandi hjálp við skúla, kostarhaldi, læknahjálp og bústaði við hjálp frá stuðulsforeldrum.

Øll hjálp til ABC barnahjálp er haldgóð og varandi. Eitt av loysnarorðum ABC barnahjálpar er, at eitt barn, ið fær hjálp til útbúgving, vinnur av tí restina av lívinum.

Ársfundurin er almennur og nevndin vónar at síggja nógv fólk á fundinum.



*- Arbeiðsloysi í landinum er stórt og tað stendur ikki á at fáa arbeiðsmegi, sigur Matthew Zakeuh, sum nú er í ferð við at gera veg inn til skúlaøkið*


# Skipaeftirlitsfólk

Skipaeftirlitið søkir eftir einum skipaeftirlitsfólki. Talan er um nýtt starv.

**Starvið er í høvuðsheitum skrivstovuarbeiði/málsviðgerð og inniber m.a. hesar upppgávur:**

- At skipa og kunna seg um altjóða regluverkið
- Samskipandi leiklutin viðvíkjandi arbeiðinum í IMO
- At samstarva tætt við løgfrøðingarnar á Skipaeftirlitinum
- At samskipa innanhýsis kunning á Skipaeftirlitinum um regluverkið
- At luttaka í uppgávum tvørtur um arbeiðsøkini á Skipaeftirlitinum undir hesum verkætlanum

**Førleikakrøv:**

- Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d. skipsførari ella maskinmeistari
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Gott innlit í sjóvinnu og avbjóðingarnar innan eftirlit, sum skip koma út fyri í altjóða høpi

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur starvsroyndir.
Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur royndir at undirvísa og hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring), ISM og ISPS.

Í starvinum er møguleikí at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági. Upplýsast kann, at lønin í løtuni er góðar 30.000,- kr. um mánaðin umframt eftirlønarskipan.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum. Starvið inniber nakað av ferðing bæði innan- og uttanlands.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi **23. mai 2007, kl. 14.30.**

**Umsóknir skulu sendast til:**
Skipaeftirlitið,
Postsmoga 26, 370 Miðvágur

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

Skipaeftirlitið
Skipaeftirlitið · Postsmoga 26 · 375 Miðvágur
Tel +298 355600 · Faks +298 355601 · fma@fma.fo



## Fíggjarleiðari til Strandfaraskip Landsins

Kanst tú stýra búskapinum? Dámar tær avbjóðingar? Ert tú ein góður leiðari?

Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum dugnaligum og dámligum fíggjarleiðara at byrja skjótast gjørligt, nú okkara fíggjarleiðari hevur tikið við nýggjum avbjóðingum í føroyska vinnulívinum.

**Starvið**
Fíggjarleiðarin hevur ábyrgdina av og skipar fyri fíggjarstýringini og roknskaparhaldinum á Strandfaraskipum Landsins. Fíggjarleiðarin er partur av leiðslubólkinum og vísir beinleiðis til stjóran.

**Umsøkjarin**
Tú hevur útbúgving og royndir innan fyri fíggjarstýring og/ella roknskap. Royndir við fíggjarstýringsskipanini hjá Navision og kunningartøkni annars eru ein fyrimunur. Vit vænta, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni, og royndir í prosjektleiðslu eru ein fyrimunur. Tú arbeiðir analytiskt og málrættað, og tú megnar at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Leiðarin hevur stóra ávirkan á egin viðurskifti og menningina av Strandfaraskipum Landsins.

Starvið er lønt í 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannsstarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, stjóra, ella Niels Juel Arge, fíggjarleiðara, á telefon 34 30 00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Skrivligar umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 21. mai 2007 kl. 12:00, og skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att.: Páll Heinesen
Yviri við Strond 4
Postboks 88
FO 110 Tórshavn

Ella teldupost: pah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Rakstrar-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.